## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin um 5 stig. Seinnapartin veksur hann vindin upp í skrið av eystri og regn. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fyrrapartin skrið ella stormur av landnyrðingi og regn. Seinnapartin minkar hann vindin niður í stívt andøvsgul av norði og sólgottar, men eisini ælingur, partvís vátakavi. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av norði og útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 1 og 4 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin andøvsgul av norði ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin um frostmarkið. Týsdagin veksur hann vindin upp í hvassan vind av eystri og regn. Lýggjari.

# Miðvika í Hoyvíkar kirkju

**KIRKJA**
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Hoyvíkar kirkja fer í vetur undir nýtt tiltak, tey nevna »Miðvika í Hoyvíkar kirkju«. Eitt kvøld um mánaðin verður skiftivís lítil konsert ávikavist fyrilestur um aktuell evni.

Tónleikurin fer fram í sjálvum kirkjurúminum, meðan fyrilestrarnir verða í kirkjukjallaranum.

Fyrsta tiltakið verður komandi mikukvøld klokkan 20, har Biedermeier trio fer at spæla. Luttakarar í hesi trio eru Katja Volovelskaja á floytu, Nikos Kapnas á violin og Bo Isholm á guitari.

Hesi eru musikklærarar í Føroya Musikkskúla og eru hartil kend í ymsum musikalskum høpi á bygd og í bý.

Skráin er løtt og varir í umleið ein hálvan tíma. Endað verður við stuttari bøn.

Skrá: Charles Blum: Nocturne la Rose
Anette Kruisbrinnk: Oasis.
J.S.Bach: Adagio í b-moll



Tiltakið er ókeypis og byrjar sum sagt kl.20

Í november verður fyrilestur í kirkjukjallaranum, har Poul Jákup Thomsen fer at tosa um foreldrauppgávuna at fyribyrgja misnýtslu hjá ungum.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 1 |
| Nuuk | 2 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 20 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 14 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 14 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 13 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 20 |
| Kiev | 21 |
| Bukarest | 22 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 24 |
| Róm | 24 |
| Malorca | 20 |
| Athen | 24 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 26 |
| Beijing | 26 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 18 |
| New York | 23 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 25 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 10 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 1018 hPa. eystan fyri Hvarvið fer eystureftir og dýpist.

**Komandi nátt:**
Lágtrystið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga eystureftir og dýpist nógv. Brúgvalagið haðani verður við Føroyar fríggjadag seinnapart við nógvum vindi og avfalli.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 30/09 kl. 06[00] – 01/10 06[00]. Hitin í gjár: 9,5°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° -
Mesti hiti máldur í oktober: +18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 30/09 kl. 06[00] – 01/10 06[00].
Avfallið higartil í oktober: 169,1 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

26. september Fyrra kvarter
28. september Mánin longst frá jørðini
4. oktober Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. okt | 05:25 | 17:43 | 04:25 | 16:43 | 04:40 | 16:58 | 07:25 | 19:43 | 08:25 | 20:43 | 03:40 | 15:58 | 02:40 | 14:58 | 05:40 | 17:58 | 06:40 | 18:58 | 05:10 | 17:28 | 06:25 | 18:43 |
| 2. okt | 06:01 | 18:16 | 05:01 | 17:16 | 05:16 | 17:31 | 08:01 | 20:16 | 09:01 | 21:16 | 04:16 | 16:31 | 03:16 | 15:31 | 06:16 | 18:31 | 07:16 | 19:31 | 05:46 | 18:01 | 07:01 | 19:16 |
| 3. okt | 06:32 | 18:50 | 05:32 | 17:50 | 05:47 | 18:05 | 08:32 | 20:50 | 09:32 | 21:50 | 04:47 | 17:05 | 03:47 | 16:05 | 06:47 | 19:05 | 07:47 | 20:05 | 06:17 | 18:35 | 07:32 | 19:50 |
| 4. okt | 07:09 | 19:29 | 06:09 | 18:29 | 06:24 | 18:44 | 09:09 | 21:29 | 10:09 | 22:29 | 05:24 | 17:44 | 04:24 | 16:44 | 07:24 | 19:44 | 08:24 | 20:44 | 06:54 | 19:14 | 08:09 | 20:29 |
| 5. okt | 07:49 | 20:10 | 06:49 | 19:10 | 07:04 | 19:25 | 09:49 | 22:10 | 10:49 | 23:10 | 06:04 | 18:25 | 05:04 | 17:25 | 08:04 | 20:25 | 09:04 | 21:25 | 07:34 | 19:55 | 08:49 | 21:10 |